


## Boeing stjelur Airbus-kundar

Tað gongst einki serligt hjá Airbus fyri tíðina. Ferð eftir ferð hevur felagið mist stórar ordrar, og tað var enn einaferð søgan, tá Korean Air Lines Company herfyri gjørdi av, hvar tey skuldi keypa nýggj flogfør. Samanlagt var talan um ordra upp á $ 5,5 mia, og hesin peningur verður allur nýttur hjá Boeing. Koreanska felagið hevur nevnliga bílagt 15 ferðafólkaflogfør og 10 fermaflogfør frá stóra amerikanska framleiðaranum.

# Fiskavirkisfólk ynskja ikki at teirra børn eisini fara í fiskavirkisvinnu



**Millum spurningarnar, sum Granskingardepilin fyri Økismenning setti sær fyri at kanna var, um arbeiðsfólk í fiskavirkisvinnuni ynskja, at teirra børn eisini skulu arbeiða í hesi vinnu. Bert 7% svaraðu ja, 62% nei – og 18%, at tey vita ikki. Hóast tølini vísa, at fólk sum heild trívast væl á fiskavirkjunum, halda kortini eini 600-800 fiskafólk, at tey kundu hugsað sær annað arbeiði, um hetta stóð teimum í boði**

FISKAARBEIÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í síðstu viku skipaði Ráfiskakeyparafelagið fyri fundi í Vinnuhúsinum, har frágreiðingin hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning, "Arbeiðsmegin á føroysku fiskavirkjunum í framtíðini", varð løgd fram.

Tað eru teir báðir, Dennis Holm og Bogi Mortensen, sum hava gjørt kanningina og hava skrivað frágreiðingina.

Á fundinum í Vinnuhúsinum legði Dennis Holm, granskari, fram niðurstøðurnar í hesi frágreiðing.

### Bakgrund

- Eins og í vesturheiminum annars, eru seinastu árini farnar fram stórar broytingar í Føroyum. Hesar broytingar síggjast eisini aftur í føroysku hagtølunum, sum viðvíkja arbeiðsmarknaðinum.

Í framløguni segði Dennis, at eitt skifti er farið fram, har alsamt fleiri fólk arbeiða innan almenna umsiting og almennar tænastur, samstundis sum færri og færri arbeiða í framleiðsluvinnuni.

Hann vísti á eitt býti av løntakarum frá árinum 1990, býtt í høvuðsbólkarnar, 1) bygging, handil, flutningur v.m. (36,0%), 2) framleiðsluvinnur (33,4%) og 3) almennar tænastur (30,6%).

15 ár seinni – ella í 2005 - er lutfalsliga býtið av løntakarum broytt, soleiðis at talið av fólki í framleiðsluvinnuni nú er minkað úr 33,4% niður í 27,0%, samstundis sum størsti einstaki bólkurin er almennar tænastur (37,1%).

Býtið í 2005 er annars hetta: 1) almennar tænastur (37,1%), bygging, handil, flutningur v.m. (35,9%) og framleiðsluvinnur (27,0%).

Í 1990 vóru tilsamans 23.774 løntakarar í Føroyum – og í 2005 var talið 24.541.

### Ung í útbúgving

Í framløguni segði Dennis Holm, at talið av ungum, sum nema sær útbúgving, er vaksið munandi seinastu árini. Fleiri og fleiri fara á miðnámsskúla – og eftir hetta undir aðra førleikagevandi útbúgving.

- Eitt av endamálunum við Visjón 2015 er eisini at hækka útbúgvingarstøðið í Føroyum.

Granskarin reisti tí spurningin, um hetta fer at fáa ávirkan á møguleikarnar hjá fiskavirkjum at fáa føroyingar at arbeiða í fiski.

- Kanningin hjá okkum er gjørd á 16 flaka-og fiskavirkjum kring landið. Tilsamans 708 fólk svaraðu spurnarbløðunum. Mett verður, at eini 1500-2000 fólk arbeiða á teimum traditionellu flaka-og fiskavirkjunum, og soleiðis hava umleið 40% av arbeiðsfólkunum luttikið í kanningini. 708 svaraði spurnarbløð er eitt sterkt grundarlag, halda Dennis Holm og Bogi Mortensen.

### Høgur miðalaldur

Um kynsbýtið á fiskavirkjum og innan fiskavøruídnað í juni 2006, sigur spurnarblaðskanningin, at 65% eru kvinnur og 35% menn. Tøl hjá Hagstovu Føroya siga hinvegin, at 57% eru kvinnur og 43% menn.

Í kanningini er eisini spurt um aldursbýti, og her vísir tað seg, at miðalaldurin er eini 39 ár. Um tey, sum eru yngri enn 20 ár, verða tikin burtur úr, er miðalaldurin eini 43 ár.

86% av teimum spurdu arbeiða á virkjunum sum arbeiðskvinna ella arbeiðsmaður, 6% sum leiðarar ella millumleiðarar og 8% sum annað.

89% hava gingið í fólkaskúla (7 ár), 58% í fólka- og framhaldsskúla (9-10 ár), 18% í miðnámsskúla, 6% hava handverksliga útbúgving, 6% hava millumlanga hægri útbúgving, 1% langa hægri útbúgving og 9% hava annað.

### Ymiskt áramál

Í kanningini vórðu fólk eisini spurd, hvussu drúgvar royndir tey hava á fiskavirki, og her vístu úrslitini, at fleiri enn 80% hava arbeitt á fiskavirki í fleiri enn 2 ár, 60% í 6 ár ella longri og sløk 40% í fleiri enn 10 ár.

At enda kann nevnast,



*Kanningin hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning vísir, at 35% av arbeiðsfólkunum innan fiskavirkisídnaðin eru menn, meðan 65% eru kvinnur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

*"Kanningin er gjørd á 16 flaka-og fiskavirkjum. Tilsamans 708 fólk svaraðu spurnarbløðunum – ella umleið 40% av arbeiðsfólkunum í fiskavirkisvinnuni"*

*(Kanningin hjá Granskingardeplinum)*